

*Sjúkrahúsið á missiónsstøðini í Gidole, har Elsa og Doris hava arbeitt*



*Hanna systir Doris, vinstrumegin og Lea, systir Elsu, vitja barnastovuna á sjúkrahúsinum í Gidole. Tær vitjaðu í 1995.*

so illa vorðið við honum. Vinstri armur var, allur sum hann var, eitt djúpt, ljótt sár. Eg vónaði, at hann ikki kom at missa armin. Hann var ein fittur og tolin smádrongur.

Annars var tað soleiðis, at klinikkin var opin seks dagar um vikuna. Sunnudagur var frídagur. Hetta bleiv eisini virt. Men vit røktu tó kortini tey, sum høvdu brúk fyri dagligari viðgerð. Vit høvdu 20 sengur og høvdu tí altíð liggjandi sjúklingar. Men var nakað, sum var akutt, fóru vit sjálvandi til verka. Sunnudagar var so eisini gudstænasta.

## Áhugi fyri at læra

Tað var gleðiligt at síggja, hvussu áhugin fyri at læra var vaksandi. Á hvørjum degi komu vaksnir menn til okkara at keypa ABC bøkur. Vit seldu eftir fáum vikum fleiri hundrað evangeliir á klinikkini. Eitt slíkt kostaði bert 30 oyru, so tað kundu øll keypa. Aftast í stóð bókstavrøðin. Men at læra hana við fleiri hundrað bókstavum var eisini eitt tak.

Úti í nógvum bygdum vóru kvøldskeið. Har sótu kvinnur og menn og stavaðu seg gjøgnum bíbliuna. Hon er skrivað á amahariskum, sum ikki er teirra móðurmál, so tey máttu samstundis læra amahariskt fyri at skilja tað, sum var skrivað.

Eisini var undirvíst í enskum, og tí dugdu fleiri hampiliga væl enskt. Men seinni gjørdist skúlin tað verri, at tey lærdu minni enskt, og var hetta sjálvsagt eitt afturstig.

## Óvæntað deyðsboð

Tríggir dreingir úr Konso fóru til Yrga Alem norðari í landinum at ganga seinasta árið á læraraskúla. Vit høvdu á ein serligam hátt glett okkum um hesar deingir, hvussu væl tað hevur gingist, og hvussu stór hjálp hetta fór at vera fyri skúlan og kirkjuliðið her í Konso. Hetta vóru fyrstu konsodeingir, sum skuldu blíva útlærdir sum lærarar. Men knappliga komu deyðsboðini um Kiffele, sum var ein av hesum deingjum. Hann gjørdist bert nøkur og tjúgu ára gamal. Hinir komu aftur til Konso og gjørdust lærarar og royndust væl alla ta tíð, eg veit um.

## Aftur hátíðarhald fyri keisaran

Sunnudagin 5. mai 1968 var hátíðarhald her í Etopia. Hendan dagin í 1941 kom keisarin Haile Selassie heim aftur eftir at hava verið í útlegd í Onglandi, meðan italienarar vóru her í landinum sum hersetingarvald.

Hesin dagur hevur verið hátíðarhildin á hvørjum ári síðan tá. Slíkar dagar savnast fólkið á ávísum stað í býnum, har talur verða hildnar. Skúlabørnini ganga skrúgongu. Tað var vakurt at síggja, tá ið tey 200 børnini, sum ganga í skúla her á kristniboðsstøðini fóru hiðani til hátíðarhaldið.

Fleiri dagar frammanundan høvdu tey lært seg sangir, sum skuldu syngjast hendan dagin. Á odda gekk ein næmingur við tí etiopiska flagginum. Síðan komu tvey børn, sum bóru skúlaflaggið við navninum Norwegian Lutheran Mission School og eini opnari bíbliu seymaðari í. Øll vóru í teimum bestu klæðunum, tey áttu. Seinni varð skúlin kallaður Mekane Yesus skúlin, tá ið hann varð gjørdur ein partur í Mekane Yesus kirkjuna. Hetta at fáa etioparar sjálvar at yvirtaka virksemið hjá missiónini var eitt mál, sum arbeitt var støðugt fram ímóti.

## Tíma ikki at taka tablettirnar ella taka ov nógvar

Stundum hendi tað, at sjúklingar, sum høvdu fingið viðgerð her og fingið tablettir heim við sær fyri nakrar dagar, komu aftur og søgdu, at einki var batnað við sjúkuni. So spurdi eg, um teir høvdu tikið tablettirnar. "Á nei," var svarið, og so komu tær allar upp úr lummanum og vórðu lagdar á borðið frammanfyri meg. Tað er nevniliga sproyturnar tey helst vilja hava! Heilivágurin skal følast fyri at tey kunnu trúgva, at hann skal virka!

Aðrar tíðir var tað beint mótsatt. Ein maður hevði fingið tablettir fyri tuberklar. Hann hevði fingið fyri 30 dagar og skuldi taka eina tablett um dagin. Verður ov nógv tikið av hesum heilivági verða fólk manisk. Hesin maður hevði tikið allar tablettirnar í senn. Tá ið hann kom, hoppaði hann í túninum sum ein villmaður. Men ikki bilti tá ið avtornaði.

## Ræðuliga spidalskasjúkan

Regntíðin var nú at vera at enda fyri hesa ferð. Tíverri hevði tað regnað heldur lítið hesa ferð. Næsta regntíð byrjaði ikki fyrr enn í mars. Regntíðin er soleiðis, at antin oysregnar um dagin ella um náttina. Regnar um náttina er tað serliga gott, tí tá skínur sólin um dagin. Tá grør so væl. Planturnar spríkja upp úr moldini.

Til klinikkina komu fólk dagliga at fáa viðgerð fyri ymiskar sjúkur. Tað er so at siga altíð fult av innliggjandi sjúklingum. Teir flestu lógu bert nakrar dagar, so kundu teir fara heima aftur frískir. So eru onnur sum lógu leingi.

Dømi um tað er ein maður, sum fekk ein stein í høvdið, so høvuðskálin brotnaði, og ein annar maður, sum datt niður úr einum træi og ryggbrotnaði. Hann varð lammaður fyri niðan miðju, og tað vóru ikki stórar vónir um, at hann fór at verða gonguførur aftur.

Ein dagin komu tey berandi við einum 10 ára gomlum dreingi, sum var bara húð og bein. Hann hevði eisini stór sár á øðrum knænum. Hann hevði ligið heima leingi uttan viðgerð. Beinið var kropnað upp undir hann, so hann fekk ikki gingið. Hann mátti liggja leingi, um nakrar vónir skuldu vera um, at hann fór at verða frískur.

Nú ein dagin kom ein maður frá Farsja, 3 tíma gongd hiðani, at fáa medisin fyri sjálvan seg, konuna og tvey børn. Tey eru øll spidølsk. Henda sjúkan er eyðkend av, at ein missir følilsir fyrst í ytri limunum, sum fingrum og tær. Tey kunnu taka gløður úr eldi uttan at merkja hitan. Somuleiðus kunna tey renna seg í og fáa sár, sum ikki lekjast. Limirnir doyggja og detta av. Eisini verða tey avskeplað í andlitinum. Men nú er góð viðgerð fyri hesa sjúku. Tó er henda sjúkan framvegis í landinum.

## Kølið í Gidole

Nú eru vit komin fram til 1969. Tá varð eg flutt til Gidole, ein støð sum liggur 50 km norðanfyri Konso.

Í býnum Gidole búgva í dag umleið 15.000 fólk, og býurin er umsitingarligur miðdepil fyri hetta øki.

Her búgva umframt amaharar nógv onnur fólkasløg, sum koma



*Býarmynd í Addis Abeba*



*Alvápnaðir Konsomenn uttanfyri klinikkina í Konso*